Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og undirvísingarmálum

Evni: Vetrarferia

Spurningar:

1. Hvussu gongur við arbeiðinum at skipa fyri vetrarferiu komandi skúlaár?
2. Hvussu er ætlanin at skipa hesa vetrarferiu?

Viðmerkingar:
Vetrarferia var eitt mál, sum fylti nakað í valstríðnum fram til løgtingsvalið. Tað tykist sum, at stór undirtøka er fyri hesum bæði millum fólk og á Løgtingi.

Í februar í ár var landsstýrismaðurin í miðlunum og greiddi frá ætlanum um at skipa vetrarferiu í 2024, og at tað varð arbeitt við møguleikanum at hava hesa vetrarferiu í viku 7.

Skúlabørnini fara í hesum døgum í summarferiu, og tá tey koma aftur í skúla um einar 8 vikur, fáa tey vanliga at vita, hvussu komandi skúlaár verður skipað. Tí nærkast vit seinastu løtu, um skipast skal fyri vetrarferiu komandi skúlaár, og tí er áhugavert at fáa at vita, hvussu tað gongur við hesum ætlanum.

Á Løgtingi, 23. juni 2023

Eirikur í Jákupsstovu